# Eitt summar við fólkatónleiki í Lounge

Hafnia Lounge verður karmur um spælimanstónleik hvørt sunnukvøld í summar. Tað er Fólkatónleikarafelagið, ið fyrst í mai fór undir at skipa fyri sonevnum Folk Sessions, har ein bólkur byrjar á pallinum hvørt sunnukvøld, og síðan er pallurin opin fyri fólki, ið hava hug at spæla við. Jasstónleikarar hava havt tílíkar jammsessiónir í barrum kring býin, og eru nú í Kagganum hvørt mikukvøld. Men nú er høvið hjá teimum við áhuga innan spælimanstónleik at royna tað sama. Kristian Blak úr Fólkatónleikarafelagnum sigur, at tílík kvøld við spælimanstónleiki verða fyriskipaði í The Lounge í Lerwick í Hetlandi, og vónin er, at vit við hesum kunnu verða við til at skapa eitt mennandi fólka- og spælimannatónleikaumhvørvi í Føroyum. Ætlanin er at byrja konsertirnar klokkan 21 hvørt sunnukvøld.

Komandi sunnukvøld luttekur týski Thomas Loefke, ið spælir harpu, eisini luttaka Kristian Blak og Sharon Weiss, ið bæði munnu teljast millum okkara royndastu spælimenn.



*Kristian Blak og Sharon Weiss*




















